Fundarfrásøgn – Skúlastýrisfundur 08.01.2026

8. januar 2026 kl 17.00

Luttakarar: Theodor Eli Dam, Anna Maria Reinert Jensen, Elin Maria Olsen, Trygvi í Liða.

1. **Fundarfrásøgn frá seinast varð lisin**
    - *Viðmerkingar:*
    - Anna Maria sigur frá samskifti, hon hevur havt við Abeiðseftirlitið ísv. at lærarar hava fingið skeld frá foreldrum, og eru sera ávirkaðir av hesum.
        1. Skúlin hevur handlað rætt, men er biðin um at skjalfesta eina tilbúgvingarætlan ísv. líknandi hendingar í framtíðini.
    - Viðvíkjandi Musikkskúlatilboði, fellur hetta burtur, og verður tí ikki kannað nærri. Tó verður skotið upp at tosa við kommununa um at fáa eina deild av musikkskúla til Hoyvíkar, soleiðis at hoyvíksbørn kunnu læra tónleik í Hoyvík.
2. **Ætlaður námsfrøðiligur fundur um næmingar og órógvan**
    - Anna Maria hevur gjørt eina mannagongd um støður, har næmingar eru ólátaðir. Vit hava støður, har næmingar ikki duga at bera seg at í flokkunum, og órógva undirvísing og allar sínar floksfelagar. Hinir næmingarnir eiga at síggja, at hetta fær avleiðingar, og at teir eru tryggir í skúlanum. Hendan mannagongdin skal leggjast fram fyri lærarunum, áðrenn hon verður løgd fram fyri skúlastýrið.
    - Leiðslan vil fegin stuðla lærarum ísv. næmingar sum órógva. Vit bjóða lærarunum at koma á skrivstovuna við einstøku næmingunum, tá tað ikki riggar at vera í skúlastovuni. Har kunnu teir sita, til teir eru klárir at fara í flokkin aftur.
    - Spurningur verður settur um næmingar framvegis vera koyrdir úr flokkinum.

      Hetta verður gjørt fyri at tryggja undirvísing til hinar næmingarnar og verja teir.

3. **Gongdin í landsroyndunum**
    - Skúlin hevur staðið seg væl í landsroyndunum, og er omanfyri miðal í landinum. Serliga hevur skúlin staðið seg væl í støddfrøði.
        1. Landsroyndin vísir á hvørjir næmingar hava brúk fyri serligari hjálp og hvar man kann seta inn.
        2. Flokkurin, sum varð vístur á, hevur fingið tvílæraraskipan í føroyskum og støddfrøði. Tosað verður um framyvir at skipa tvílærarar á sama hátt, kanna um tað gevur úrslit.

4. **Rátt uppskot um mannagongdir viðv. telefonum hjá næmingum**

    - Eitt útkast til eina mannagongd um fartelefonir er eisini gjørt. Hendan verður løgd fram fyri lærarum í næstum.

5. **Felags foreldrafundur 12. Januar kl 19.00**

    - Fundurin verður í pyramiduhøllini, og temað er alment dannilsi í mun til einstaklingin og felagsskapin.
    - Skúlastýrið sigur nøkur orð, síðani hevur Urd Johannesen ein fyrilestur um dannilsi. At enda syngur Kári P nøkur løg.
    - Theodor sendir eina lýsing til útvarpið.
    - Skúlin bjóðar kaffi og okkurt afturvið.

6. **Ymist**

    - **Vit hava havt ein leka av einum røri. Tað er herfrá soppurin kemur.**
    - **Tvílæraraskipan**

      Hvussu effektiv er tvílæraraskipan?

      Tað er munur á eykalærara og tvílæraraskipan (co-teaching). Eykalærari er inni einstakar tímar, og hevur ikki ábyrgdina av heildarundirvísingini, tí er hetta ikki eins effektivt og tvílæraraskipan (co-teaching), har tveir lærarar eru felags um eina lærugrein altíð. Her hava vit miðfirraðar tímar, sum í nógvum førum verða brúktir til at lærari kann stuðla í flokkinum ávísar tímar.

    - **Talgild amboð í undirvísingini**

      Tosað varð um í hvønn mun talgild amboð økja um læringina hjá næmingunum, ella um tey órógva undirvísingina.

    - **Skipan viðvíkjandi nýggjum skúla**
      Tosað var um hvussu skúlatilmeldingin fer fram og hvussu skúlaskipanin skal vera, tá nýggjur skúli kemur.

Fundurin lokin kl: 18.25